Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Prísáseting hjá Landssjúkrahúsinum

Spurningar:

1. Hevur Landssjúkrahúsið endurskoðað prísásetingina til innan- og uttanhýsis keyparar so sum Klaksvíkar sjúkrahús, Suðuroyar sjúkrahús og Heilsutrygd?
2. Um ja, nær kemur prísásetingin í gildi?
3. Á hvørjum støði verður prísásetingin í mun til verandi áseting?

Viðmerkingar:
Í frágreiðing, sum Norðlýsið hevur fingið innlit í, stendur, at Landssjúkrahúsið forvinnur væl upp á at selja til aðrar partar í heilsuverkinum. Skiftisavkastið liggur um eini 20%.

Eisini stendur í frágreiðingini, at Landssjúkrahúsið má endurskoða prísásetingina til bæði innan- og uttanhýsis keyparar.

Í dag hava sjúkrahúsini eina felags leiðslu og skulu samstarva um at menna alt heilsuverkið. Tí kann ein seta spurnartekin við, um tað er í lagi, at ein av teimum fyrrverandi sjálvstøðugu eindunum hevur lutfalsliga stóran vinning av at selja vørur og tænastur til hinar fyrrverandi sjálvstøðugu eindirnar, seg sjálva og Heilsutrygd.

Fyri at fáa greiðu á, um ætlanin er at broyta hesa skipan, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 17. januar 2022

Eyðgunn Samuelsen